Hjá Lorenz

- Reparatión av landbúnaðarmaskinum
- Maskinur á goymslu - nýggjar og brúktar
- Merkini Reform, Grillo og Bauer.

Hjá Lorenz
Smiðjugerði
(við síðuna av Bilfríðkan)
Tlf. 318151 Fax 318153

Summarfrí

Stongt verður frá 26. juli til 16. august.

MATRIKULSTOVAN

Søkt verður eftir timburmonnum

til renoveringsarbeiði í Maniitsoq, Grønlandi, tlf. 81 21 30, fax 81 21 33, fartlf. 57 60 06. Kontaktpersónur er Stein Olvur Petersen.

Nunabyg A/S

Vørukoyring

tá okkurt skal koyrast.

Tlf. 21 88 11



Stuðulsstovnurin

Í tíðarskeiðnum frá 26. juli til 6. august (báðir dagar íroknaðir) verður stongt vegna summarfrí.

Stuðulsstovnurin
Falkavegi 6
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Frá Javnaðarflokkinum

Landsstevnan '99

verður í Skopun 17. og 18. sept.

Føroya Javnaðarflokkur

Býráðsskrivstovan í summarfrítíðini

Býráðsskrivstovan **letur ikki aftur** í summarfrítíðini, men í tíðarskeiðnum:

19. juli - 13. august

verður telefonin svarað, og bert tað mest átrokandi avgreitt.

Klaksvíkar Býráð
Tlf. 45 63 88
Fax 45 63 99

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið

Starv á Toll- og Skattstovu Føroya

Til eftirlitsdeildina í Stýrinum, sum heldur til í fíggjarmálastýrinum á Argjum, verður søkt eftir fulltrúa til at taka sær av roknskapar- og virkiseftirlitsmálum, og at fyrireika virkiseftirlitið og skattaumsitingina annars til eina møguliga komandi oljuvinnu.

Tann, ið settur verður, kemur at hava tætt samarbeiði við loyvisgevandi myndugleikan á kolvetnisøkinum, og kemur meira ítøkiliga at arbeiða við og leggja til rættis roknskaparliga virkiseftirlitið v.m. í skattligum høpi á kolvetnisøkinum.

Uppgávurnar hjá eftirlitinum eru annars:

- at geva roknskaparliga leiðbeining til Økisskrivstovurnar í sambandi við samskipað avgjalds- og skattaeftirlit á virkjum.
- Vinnugreinaeftirlit og grannskoðan av truplum málum.
- At gera og leggja til rættis innanhýsis vegleiðingar- og rundskriv um roknskaparkrøv til skatta-, meirvirðisgjald- og tollroknskapir saman við lógardeildini.
- Undirvísa starvsfólkum í nýggjum arbeiðsháttum í samband við nýggja lóggávu v.m.
- Umsita og menna alla vegleiðing á roknskaparliga økinum bæði innanhýsis og í sambandi við Økisskrivstovurnar.
- Fyrireika og kunna kolvetnisfeløg, almenningin o.o. um roknskaparligu krøvini í samband við kolvetnisskattalóggávuna saman við hinum deildunum í Stýrinum.

Í Stýrinum, har umsøkjarin kemur at starvast, eru 27 starvsfólk, skipað í stjórn og 4 deildir - lógardeild, menningardeild, virkiseftirlitsdeild og umsitingardeild.

Stýrið hevur hesar uppgávur

- hægstu planlegging
- stýring, eftirlit og menning
- samskiftir við Landsstýrið og Toll- og Skattaráðið
- virkar sum ráðgevi hjá økjunum í fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, eftirlit og innkrevjing.

Setanarøkið annars fevnir um aðalstýrini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

Førleiki
Góður roknskaparligur førleiki krevst. Prógv frá lærdum háskúla er ynskiligt og ein fyrimunur. Líknandi útbúgvingar frá øðrum stovnum geva eisini fyrimun, og royndir í almennari umsiting av kolvetnisskattalóggávu og kunnleiki til kolvetnisvinnu annars gevur eyka fyrimun.

Vit kunnu bjóða

- sjálvstøðugt starv
- avbjóðingina at byggja upp eina nýggja grein innan føroyska skattaumsiting
- samskifti við starvsfólk á øllum deildum stovnsins og við hini aðalstýrini, serliga fíggjarmálastýrið og oljumálastýrið
- flex-tíð
- gott arbeiðsumhvørvi
- skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Starvið verður lønt sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, ummælum o.ø. skulu vera okkum í hendi seinast 16. august 1999 og skulu sendast til

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postboks 2151
165 Argir

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til stjórnina á Toll- og Skattstovu Føroya, tlf. 35 20 26.

Toll og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalóggávuna. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum, ið heldur til á Argjum. Tær sjey økisskrivstovurnar, sum eru í Klaksvík, Saltangará, Sørvági, Skopun, á Tvøroyri, og í Tórshavn, røkja raksturin.